FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ
MINISTRY OF FINANCE

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
Postboks 208
110 Tórshavn

Tórshavn, 12. november 2019

J.Nr.: 19/00425-2

Tygara skriv: nr. 16/2019

Svar uppá fyrispurning nr. 16/2019 eftir tingskipanini §52a

Fyrispurningur frá Heðini Mortensen, løgtingsmanni, settur Jørgeni Niclasen, landsstýrismanni í fíggjarmálum, um Suðuroyartunnil.

Fyrispurningurin er soljóðandi:

1. Ætlar landsstýrismaðurin at seta eitt alment tunnilsfelag á stovn fyri Suðuroyartunnilin?

2. Um so er, nær ætlar landsstýrismaðurin at stovnseta felagið?

3. Kunnu vit vænta, at farið verður undir forkanningar og fyrireikingar til Suðuroyartunnilin, meðan arbeiðið við Sandoyartunlinum fer fram?

Svar:

Til nr. 1

Arbeiðsbólkurin, sum skrivaði "Álit um møguleikar, fyrimunir og vansar, at gera ein Suðuroyartunnil", mælti til, at byrjað verður at bora og spreingja Suðuroyartunnilin í 2023. Grundgevingin er, at í 2023 er fíggjarligi váðin av verkætlanini Eystur- og Sandoyartunnilin minkaður munandi. Tá ið Eysturoyartunnilin hevur verið opin í 1-2 ár, síggjast greiðar ábendingar um, hvørt inntøkurnar frá tunnilsgjaldinum í Eysturoyartunlinum vera sum væntaðar.

Byggitíðin í sambandi við Suðuroyartunnilin er mett at vera 7-9 ár tilsamans fyri bori- og spreingiarbeiði og fyri at gera tunnilin lidnan. Prosjekteringin av Suðuroyartunlinum fer væntandi at taka 1-2 ár, áðrenn byggiverkætlanin kann bjóðast út.

Samlaði kostnaðurin av verkætlanini er fyribils mettur til um 3-3,5 mia. kr. Tunnilin verður um 22-26 km. langur alt eftir, um tunnilin verður í einum ella, um tunnilin verður í tveimum umvegis Skúvoynna.

Leisturin, sum higartil hevur verið brúktur, har almenn partafeløg hava staðið fyri at fyrireika, byggja og reka undirsjóvartunlar hevur sambært arbeiðsbólkinum, sum skrivaði "Álit um møguleikar, fyrimunir og vansar, at gera ein Suðuroyartunnil", víst seg at rigga sera væl. Góðar royndir hava eisini verið í okkara grannalondum av at skipa stórar útbyggingar av vegakervinum í almenn partafeløg, sum hava staðið fyri lántøku, sum síðani verður afturrindað við nýtslugjøldum. Nevnast kunna Stórabeltsbrúgvin og Oyrarsundsbrúgvin í Danmark og Svøríki og tunnilin undir Hvalfjørðin í Íslandi.

Samgongan heldur tí eins og arbeiðsbólkurin onga orsøk vera at gera annað hesum viðvíkjandi, enn at stovna eitt alment partafelag P/F Suðuroyartunnilin. Felagið skal so hava til uppgávu at fyrireika, byggja og reka Suðuroyartunnilin, umframt at fáa til vega fremmandu fíggingina til verkætlanina, sum síðani verður afturrindað við nýtslugjøldum. Hetta tó í tøttum samstarvi við myndugleikarnar fyri at fáa fíggjað verkætlanina til ein so lágan fíggjarkostnað sum gjørligt.

Til nr. 2

Landsstýrið ætlar at stovna eitt alment tunnilsfelag fyri Suðuroyartunnilin, tá ið verkætlanin er búgvin til tað og tá ið politiska skipanin, Løgtingið og landsstýrið, hava viðgjørt og tikið støðu til týðandi spurningar í sambandi við verkætlanina. Nevnast kunnu fíggingarleistur, linjuføring, um talan skal vera um ein ella tveir tunlar og hvat gerast skal við grótið úr tunlinum.

Til nr. 3

Samgongan ætlar, at farið verður undir forkanningar og fyrireikingar til Suðuroyartunnilin, meðan arbeiðið við Sandoyartunlinum fer fram.

Tinganes, 12. november 2019

Jørgen Niclasen
Landsstýrismaður í fíggjarmálum